Vegna vaksandi virksemi **søkja vit eftir tveimum fólkum** at byrja skjótast tilber



## Grafiskt hjálparfólk

Tað er framvegis eingin treyt, at tú eitur Petur, men tú mást duga nøkulunda tað sama sum vit; at halda í músini, Photoshop, Quark, Freehand ella Illustrator. Tú situr kanska dagliga og arbeiðir við hesum forritum, men vilt hava nýggjar avbjóðingar og royna eitt nýtt umhvørvi. Tú hevur gott hugflog, góð samstarvsevni og vilt sleppa at arbeiða í einum virki við nógvum spennandi og fjølbroyttum uppgávum. Tað ger einki, um tú ert grafikari ella hevur líknandi royndir.

## Web Design

Ert tú teldufreak og dugir at gera heimasíður og líknandi uppgávur, so er hetta kanska nakað fyri teg. Vit sóknast eftir einum fólki, ið veit hvat html-forritan er og hvat Flash, GoLive og onnur líknandi forrit kunnu brúkast til. Tú kennir møguleikarnar við internetinum og kundi hugsað tær at arbeitt í einum virki við nógvum spennandi og fjølbroyttum uppgávum. Tú hevur gott hugflog, góð samstarvsevni og kanst arbeiða sjálvstøðugt.

### Løn og treytir

Hevur tú hug at at gerast okkara grafiska hjálparfólk ella okkara webdesignari so skriva nøkur orð um teg sjálvan, hvat tú dugir og hevur hug at arbeiða við. Løn og aðrar treytir eftir nærri avtalu. Tú kanst eisini fáa meira at vita um størvini við at ringja til okkara og spyrja eftir Petur. Umsóknir skulu vera okkum í hendi **innan 8. september 2000.**

**petur&petur**
R E K L A M U V I R K I
Jónas Broncksgøta 33 • Postboks 1012 • 110 Tórshavn
Tel 320 870 • Fax 320 871 • petur@petur.fo • www.petur.fo

P/F Petur & Petur byrjaði reklamuvirksemi tann 1. mars 1999 og ger í dag marknaðarføringsuppgávur fyri bæði stórar og smáar fyritøkur í Føroyum. Hjá Petur & Petur starvast trý fólk: Petur, Petur og Armgarð umframt Inga í bókhaldinum. Felagið er júst flutt í nýggj høli í Jónas Broncksgøtu 33.

## Kunningar- og samskiftisfólk

Eitt hálvtíðarstarv innan kunning og samskifti er leyst at søkja til setan frá 1. oktober ella skjótast til ber. Arbeiðsstaður er setursskrivstovan, men arbeiðsuppgávurnar fevna um alt Fróðskaparsetrið.

**Arbeiðsuppgávur**
Tann, ið verður settur í starv, skal m.a.:
- gera upplýsandi tilfar um Setrið til almenning og studentar innan- og uttanlands
- skipa fyri tiltøkum av ymsum slag

Størsti denturin verður lagdur á at gera tilfar til og røkja heimasíðu okkara.

**Førleikakrøv**
- Útbúgving innan kunning, marknaðarføring, journalistikk ella góðar royndir innan tílíkt arbeiði
- Skal duga væl at skriva á føroyskum, donskum og enskum
- Skal hava royndir í heimasíðuforritan
- Skal vera skapandi, duga at taka ímóti hugskotum og fremja tey í verki
- Skal hava evni at samstarva tvørfakliga

**Setanartreytir**
Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og avvarðandi yrkisfelag. Fyrsta ár er royndarár.

Umsókn við yvirliti yvir starvsroyndir, avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu stílast til setursskrivaran og vera Fróðskaparsetrinum í hendi innan 15. september 2000. Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Setursskrivstovuna tlf. 31 53 02.

**Fróðskaparsetur Føroya**
Setursskrivstovan
Handan Á 5
100 Tórshavn
annikajo@fsf.fo
www.sleipnir.fo/setur

## Útróðrarbáturin

M/B Havfarið til sølu.

**Tlf. 457735 ella 220086**

Frá
## Suðurstreymoyar Javnaðarfelag

## Fundur

verður mánakvøldið 28. aug. kl. 20.00 í hølunum hjá Starvsmannafelagnum, J. H. Schrøtersgøta 9.

Skrá:
1. Annar og møguliga triði uppstillingarfundur til býráðsvalið
2. Landsfundurin
3. Ymiskt

**Nevndin**

## Arbeiðsfólk til Leirvíkar Kommunu

Søkt verður eftir tímaløntum arbeiðsfólki til fyrifallandi arbeiði hjá Leirvíkar Kommunu.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Kommunuskrivstovuna, tlf. 443006.

Lønin er eftir sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Umsóknir skulu vera Leirvíkar Kommunu skrivliga í hendi í seinasta lagi mánadagin 4. september 2000.

**Leirvíkar Kommuna**
Postrúm 42 · 520 Leirvík

## Lærarastørv

Við føroyska barnaskúlan í Århus eru tvey lærarastørv leyst at søkja.

Skúlagongd er 4 tímar annanhvønn leygardag. Størvini verða sett fyri eitt ár í senn.

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi tann 10/9. Nærri fæst at vita við at venda sær til:

Finn Klein
Kirsebærhaven 69A, 1.sal
8520 Lystrup

Tlf. 0045 86220119
E-mail: finnur.klein@get2net.dk

# DANSISKEIÐ



**Um nóg nógv tekna seg verður dansiskeið í Glæmuni í Kvívík, vikuskiftið 1. - 2. september**

Undirvíst verður í eingilskum dansi: Fox-Trot, Quick-Step, Rock'n roll, valsi o.ø. Skeiðið er fyri øll dansiáhugað: Pør-støk, børn-ung, nýbyrjarar og vandar dansarar. Aldursmark 7 ár. Anna Kirstin av Tvøroyri undirvísir.

**Dansað verður í 4 holdum**
Hold 1: Børn 7-9 ár
Hold 2: Børn 10-14 ár
Hold 3: Nýbyrjarar
Hold 4: Vandir dansarar

**Kostnaður fyri skeiðið:**
Børn kr. 80,-
Vaksin: kr. 150,-

**Fríggjadagin 1. sept. dansa vit hesar tíðir:**
Hold 1: kl. 15.00-16.00
Hold 2: kl. 16.15-17.15
Hold 3: kl. 18.00-20.00
Hold 4: kl. 20.15-22.15

**Leygardagin 2. sept. dansa vit hesar tíðir:**
Hold 1: kl. 13.00-14.00
Hold 2: kl. 14.15-15.15
Hold 3: kl. 15.30-17.30
Hold 4: kl. 18.00-20.00

**Tilmelding á tel. 421460 og á tel. 421680 frá mánakvøldinum 28. aug. til mikukvøldið 30. aug. millum kl. 19.00 og 21.00.**



**Leygarkvøldið 2. sept. spælir vælumtókta orkestrið Moonshot úr Vestmanna til almennan dans frá kl. 24.00. Kostnaður fyri dansin kr. 100,- (Tey, sum luttaka í dansiskeiðnum gjalda kr. 50,- fyri dansin).**

**GLÆMAN OG K.S.R.**

Sosialurin - 311820

## Ferðaráð Føroya søkir Samskipara

Ferðaráðið søkir ein samskipara í sambandi við at ein heildarætlan fyri skelting skal gerast fyri Føroyar sum ferðamannaland. Talan er um eitt avmarkað starv í 6 mánaðir.

Arbeiðið verður lagt til rættis av samskiparanum í samstarvi við deildina Innlendis Menning á Ferðaráðnum og Landsverkfrøðingin. Samskiparin refererar til stjóran á Ferðaráðnum.

**Endamálið við starvinum:**
- Gerð av einari fullfíggjaðari kravfesting til skelting, nátt- og tvátthús, dvalarvikar og tjaldingarpláss í Føroyum.
- Kravfestingin skal verða eitt víðari arbeiðsamboð hjá Vinnumálastýrinum, kommunum, landsverkfrøðinginum og Ferðaráðnum.

**Fylgjandi førleikar og royndir eru ein fyrimunur:**
- Royndir frá starvi við prosjektleiðslu og samskipan.
- Holla vitan um Føroyar og føroysk viðurskifti sum heild og sum ferðamannaland.
- Kunnleika til lendis- og matrikulviðurskifti í Føroyum.
- Kunnleika til náttúruviðurskifti.
- Kunnleika og atlit til føroyska siðvenju ísv. ferðing í náttúruni.
- Kunnleika til almenna og kommunala fyrisiting herundir arbeiðsgongdir.
- Hollan kunnleika til edv.

**Neyðugt er at tann, ið settur verður:**
- Er førur fyri at samskifta sera breitt.
- Megnar at hava yvirlit yvir fleiri málum í senn og samla træðrir.
- Er fleksibul, tá arbeiðið krevur nakað av ferðing í Føroyum og møguliga uttanlands.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og Starvsmannafelagið/viðkomandi yrkisfelag.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Hera Niclasen, stjóra, ella Annleyg Lamhauge, Innlendis Menning, á tlf. 316055.
Skrivlig umsókn við avritum av prógvum v.m. skal vera Ferðaráðnum í hendi í seinasta lagi mánadagin 18. september 2000.

**Ferðaráð Føroya**
**Postsmoga 118**
**Fo -110 Tórshavn**

Ferðaráð Føroya
www.tourist.fo

Sosialurin - 311820

# Dugnaligur frisørsveinur søkist. Góð løn.



**Salong Bylgjan**

Billugøta 2 • 160 Argir • Tel. 31 54 94

Sosialurin - 311820

# KYNDIL

## Venjingartíðir 2000/2001

### Høllin á Hálsi

| Klokkan | Mánadag | Týsdag | Mikudag | Hósdag | Fríggjadag |
|---|---|---|---|---|---|
| 15.00-16.00 | * | Ge. 10 + Dr. 10 | | | |
| 16.00-17.00 | | Gentur 12 ár | | | |
| 17.00-18.00 | | Gentur 14 ár | | | |
| 18.00-19.00 | | Kv. 1 + 2 + Kv.u. | | | |
| 19.00-20.00 | | Menn 1 + 2 | | | |
| 20.00-21.30 | | | | Menn 1 + 2 | |
| 21.30-23.00 | | | | Kv. 1 + 2 | |

* Dreingir 10 ár venja í Badmintonhøllini mánadag kl. 15.00-16.00

### Gundadalshøllin

| Klokkan | Mánadag | Týsdag | Mikudag | Hósdag | Fríggjadag |
|---|---|---|---|---|---|
| 14.00-15.00 | | | | | |
| 15.00-16.00 | | | Dreingir 12 ár | Ge. 12 ár | |
| 16.00-17.00 | | | Dreingir 14 ár | Ge. 14 ár | Dr. 12 ár |
| 17.00-18.00 | | | Mini-hondbóltur | | Dr. 14 ár |
| 18.00-19.00 | | | Dr. 16 + M.u. | | |
| 19.00-20.00 | Kvinnur 3 | | | | |
| 20.00-21.30 | Kvinnur 1 + 2 + Kv.u. | | | | |
| 21.00-22.00 | | | | | Dr.16 + M.u. |
| 21.30-23.00 | Menn 1 + 2 | | | | |

**Byrjar mánadagin 28. august**

**Mini-hondbólturin byrjar 27. september**

| | |
|---|---|
| Mini-hondbóltur | f. 1992-1996 |
| 10 ár | f. 1990-1991 |
| 12 ár | f. 1988-1989 |
| 14 ár | f. 1986-1987 |
| 16 ár | f. 1984-1985 |
| Kv. ungl. | f. 1981-82-83 |
| M. ungl. | f. 1982-1983 |

Sosialurin - 311820

*Halt* **sosialin**